**Formansfrágreiðingin  fyri 2022**

Eftir aðalfundin í fjør, sum varð hildin í Listamannahúsinum, skipaði nevndin seg við:

Hilmari Høgenni formaður,

Pál Weihe sum næstformaður,

Katrin í Gongini, vevstjóri,

Julianna Klett, umsitari av Kambanshúsi,

Leivur Holm, skrivari

Regin Vilhelm,kassameistari

Felagið er í farna árið komi í gongd aftur aftan á Korona-farsóttina.

**Ólavsøkuframsýningin**

Felagið heitti í fjør á Bárð Dal Christiansen at skipa fyri ólavsøkuframsýningini.

Undir heitinum ”Skøra” hevði hann valt út fjølbroytt verk, bæði útlendsk og føroysk.  Heitið stavar frá plantuni Skøru. Undir røttu umstøðum veksur Skøran vilt, og hon kann vera trupul at sleppa av við, tá hon hevur fingið røtur. Mong halda ikki, at skøran passar inn í okkara vøkru urtagarðar, har alt er plantað við nærlagni, men kanska snýr tað seg um, hvussu vit hugsa um hetta ókrútið, Skøruna. Tí gevur ein sær far um tað, er hon í roynd og veru er ein vøkur planta. Framsýningin í fjør var ment í hesum myndamáli.

Fyriskiparin gjørdi eina roynd at vísa list úr umheiminum, sum hann vónaði kundi geva íblástur og “skøra upp í eldinum”.  Felags fyri allar luttakararnar á framsýningini var at hettar vóru spennandi og roynd listafólk. Onkur virkin á gøtuni, onnur á gallaríum og á pallum.

Sum heild vóru vit samd um, at væl var skipað fyri og at framsýningin eydnaðist væl. Bárður hevði sett saman eina áhugaverda framsýning, sum fekk umrøðu bæði her heima og í Danmark.

Onkur ummælari vildi tó vera við, at: “*Nevndin í Listafelagnum átti at hugsa seg betri um og heitt á kuratorar í góðari tíð, so at tey náa at skipa fyri einari føroyskari stutt fluttari, burðardyggari listaframsýning á ólavsøku við høgari góðsku hjá leikum og lærdum, so at framsýningin aftur letur føroyska myndlist hava ein náttúrligan høvuðsleiklut á ólavsøku*”.

Til at skip fyri ólavsøkuframsýningini í ár,  heitti felagið í heyst á Kirstin Helgadóttir. Uppleggi hennara til framsýningina hevur verið hetta:

“*Ólavsøkuframsýningin savnar føroyingar á tjóðarhátíðini og tí er hóskandi, at hon lýsir hvat rørir seg í listaheiminum í Føroyum - men eisini úti í heimi.  Ætlanin er at bjóða ávísum listafólki at skapa karmarnar um framsýningina umfram at gera eitt “call for art”. Roynd og óroynd, føroysk og*

*útlendsk listafólki, sýna livandi litrík verk, ið tora at seta truplar spurningar og bróta upp úr nýggjum, tá talan er um myndevni og arbeiðshátt. ynski er, at verkini hava ein "puls" ið lýsir okkara samtíð. Ynskiligt er, at verkini á framsýningini pallseta náttúru og lív - ímillum katastrofu og sofu. Verkini eru politisk, droymandi, viðgera flótandi seksualitet, biodiversitet, kærleika, andstygd, felagsskap, einsemi. Framsýningin skal helst fevna um heilan alaboga av kenslum. Ímillum hugflog og (post) veruleika*".

Heiti verður:

Gerandis opinberingar (Everyday Apocalypse)

**Listaferðin í farna ári**

12.-16. oktobur skipaði felagið fyri túri til  Oslo, sum altíð var fullteknað beinan vegin. Vitjað var m.a. á Deichman bókasavninum, operaini, nýggja Munch savninum, nýggja tjóðsavninum, sum er største savn fyri list, arkitektur og design í Noreg, Astrup Fearnley savnið og Vigelandsparkina fyri at nevna okkurt.

Hettar var ein sera fínur túrur, Oslo er ein spennandi býur, sum fegin brúkar pengar uppá mentan, tað myndar býin. Tí er tað eisini  ein fragd at ganga runt í býnum. Fólk vóru væl nøgd við túrin.

**Nýggj heimasíða**

Tíðliga í vár fekk felagið nýggja heimasíðu sum Sansir hevur gjørt.

**Stuðul**

Felagið veitti Jóhan Martin Christiansen 10.000 kr. í stuðli til gerð av verkinum:  "Tú ert eitt blomstur og um veturin sakni eg teg", sum var við á framsýningini:  Nýbrot: Føroysk samtíðarlist í stórum formati sum var í fjør heyst á Lisatasavninum

**Keypt verk**

Á várframsýningini í fjør keypti felagið verkið "Tikin við ella latin eftir" hjá Lív í Beianstovu.

Í novembur í fjør keypti felagið eitt verk hjá Birgith Kirke á framsýning í Listamannahúsinum.

Í apríl keypt felagið eitt verk  "Uttan heiti" Hansina Iversen 2023. Listafelagið hevur ognað sær hetta verk á framsýningini Purple Rain, sum var í Steiprent.

**Limatiltøk**

Í novembur vitjaðu vit  Skúlan við Streymin saman við Astri Luihn.

Listaverkini hjá Astri Luihn prýða víðkaða skúlan og ítróttarhøllina í skúlanum, verkini lýsir søgur úr Sjúrðarkvæðunum, ið Jógvan kalsmaður frá Norðskála var heimildarmaður til í 1817, og ævintýrið Trøllið á Fjallinum frá Gjógv.

Støddfrøðin er eisini vovin inn í listaverkini sum mynstur, frymlar og geometriskir figurar og formar; eitt nú Gylti snyrilin.

Brynhild Kamban og Helgi Arnþórsson vóru eisini við. Hon greiddi frá um Sjúrðarkvæðini og hann um støddfrøðina í verkunum.

Í apríl vitjaðu vit skúlan á Fløtum. Inga Katrin Winther, arkitektur, greiddi frá um skúlan, hvussu tilgongdin til kappingaruppskotið kom í lag og hvørjar tankar tey høvdu gjørt sær, tá tey gjørdu uppskotið.

Listamenninir Edward Fuglø og Jón Sonni Jensen greiddu frá um tey listaverk teir høvdu skapt til skúlan.

Í apríl  skipaði felagið eisini fyri tiltaki í Finsen. Sýnd vóru videosamrøður við listamannin Edward Fuglø um 5 av 10 av hansara træskurðum í kjallaranum í Christianskirkjuni í Klaksvík. Í samrøðunum greiddi Edward frá verkunum og sínum hugsanum aftanfyri verkini.

**Tað er næsta**
Janus Kamban hevði verið 110 ár komandi 10. septembur. Hetta skal markerast við at hava opið hús í Klokkaragøtu, har limir kunnu ogna sær verkið við Fuglunum fyri favørprís. Vit ætla eisini at fáa kommununa at hjálpa okkum við rakstrinum av Listamannahúsinum.